Summarkapping 2007

Oslo:

# Dómkirkjan – ein opin kirkja

**Oslo er ein býur, har tú kanst uppliva mangt og hvat. Millum annað hevur býurin nógv kend søvn og nógvar kendar kirkjur, og vit fara at hyggja eitt sindur at nøkrum av kendastu kirkjunum í norska høvuðsstaðnum**

SUMMARKAPPINGIN
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*



*Í Oslo dómkirkju fara nógvar týdningarmiklar hendingar í samband við kongshúsið, Stórtingið og stjórnina fram. Hetta er tó bert ein av fleiri kendum kirkjum í Oslo*

**FAKTA**

| | |
|---|---|
| Høvuðstaður í Noregi: | Oslo |
| Íbúgvaratal: | 500.000 |
| Dómkirkja: | Oslo domkirke, bygd í 1667 |
| Aðrar kendar kirkjur: | Clemens kirken og Gamle Aker kirke |

Oslu hevur eins og nógvir aðrir stórbýir nógvar gamlar kirkjur, ið eru áhugaverdar fyri ferðafólk at vitja. Umframt dómkirkjuna, so eru kirkjur í býnum, ið stava heilt frá 1100-talinum, og hóast allar eru umbygdar, so er tó okkurt eftir av tí upprunaliga.

### Dómkirkjan

Fert tú ein gongutúr í miðbýin í Oslu, ber til at hyggja inn í Oslo dómkirkju, ið liggur tætt við sjálvan miðbýin. Kirkjan er ikki bert dómkirkja í høvuðsstaðnum, men er eisini týdningarmikil fyri almenna Noregi. Í hesari kirkjuni fara týdningarmiklar hendingar í samband við kongshúsið, Stórtingið og stjórnina fram.

Kirkjan er bygd í 1667, men verður í løtuni sett í stand.

Dómkirkjan í Oslo er ein opin kirkja. Øll skulu hava møguleika at koma í kirkju hvønn dag. Endamálið er at hava eitt trygt stað í miðbýnum, sum tú kanst vitja, tá tú hevur hug til tess. Kirkjan er opin allar dagar í árinum ímillum kl. 10 og 16. Umframt gudstænasturverður eisini skipað fyri konsertum, og kirkjan hevur egið kór, Oslo Domkor.

Í gomlum døgum varð tornið nýtt sum brandtorn. Ofta herjaðu eldar í Kristiania, sum býurin æt. Tað var tí av stórum týdningi fyri brandliðið í býnum, at fastar vaktir hildu vakt upp í torninum, tí haðani høvdu tær gott útsýni yvir allan býin.

Kirkjan er broytt innan fleiri ferðir, síðan hon varð bygd. Seinast, ið hon varð broytt, var í 1950. Prædikastólurin í kirkjuni, sum er komin úr Hollandi, er líka gamal sum kirkjan sjálv. Hann er gjørdur í stand, men hevur varðveitt sína upprunaligu útsjónd. Altartalvan er frá 1700 og doypifonturin frá 1721.

Oslo dómkirkja hevur eitt nýtt konsertklokkuspæl við 48 klokkum. Klokkuspælið er ein gáva til kirkjuna. Tann største klokkan vigar 680 kilo og tann minsta 7 kilo

Beint aftan fyri Oslo dómkirkju ber til at vitja gomlu basarhøllirnar frá 1848. Tær liggja í einum grønum, friðarligum umhvørvi beint aftan fyri kirkjuna mitt ímillum tær ferðamiklu gøturnar í miðbýnum. Her ber til at njóta góðar matstovur, bæði úti og inni ella hyggja eftir teimum mongu ymisku framsýningunum, serliga innan brúkslist.

### Clemens kirkjan

Oslo Dómkirkja er tó ikki einasta kenda kirkja í norska høvuðsstaðum. Clemens kirkjan er ein steinkirkja frá 1100-talinum. Clemens kirkjan var sóknarkirkja fyri sunnara part av býnum. Hildið verður, at tvær trækirkjur hava staðið á sama stað undan hesari kirkjuni. Kirkjan hevði tvey skip, men hildið verður, at rúmið, har vanliga kirkjufólkið kom, var tvíbýtt. Kirkjan hevur ikki hválv í takinum, so takið hevur helst verið nýtt til lagur fyri ymiskar vørur.

Kirkjuruinin frá miðøld er nú sett í stand og er vorðin ein partur av Oslo Miðaldarbýi. Undir ruinini er landsins elsti varðveitti kirkjugarður.

### Gamla Aker kirkjan

Gamla Aker Kirke stendur ovast á bróttu, vøkru brekkuni, Telthusbakken, sum er ein av teimum hugnaligastu, gomlu gøtunum í Oslu, sum eru varðveittar. Telthusbakken var høvuðsvegurin vestureftir í 1500-talinum.

Gamle Aker kirke er bygd í 1100-talinum og er elsti bygningur í Oslo. Søgnin sigur, at undir gomlu Aker kirkjuni vóru fýra drekaholur. Ein vælvaksin dreki ansaði einum silvurskatti, sum varð fjaldur undir kirkjuni. Eisini varð sagt, at kirkjan stóð á stólpum, sum vóru úr gulli. Undir stólpunum var ein lítil tjørn, har fýra gulldunnur svumu.

Gamle Aker Kirke er gjørd í stand. Hon var í sera ringum standi, bæði orsakað av álopum og eldi.



*Puntur nummar 11 av 23*




Uttan mun til hvar, og hvussu leiðin gongur, er tað umráðandi at fara tryggur avstað. Byrja ferðina hjá okkum, soleiðis at tú fært allan tín tørv nøktaðan og tryggur kanst njóta ferðina.

Kongabrúgvin, Postboks 329, 110 Tórshavn, Tel 345600, Faks 345601, tf@trygging.fo, www.trygging.fo

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR
- so ert tú tryggari